## Eftirlitið haltar

ESA, sum er eftirlitsskipanin hjá handilsfelagsskapinum EFTA, fýlist í einari nýggjari frágreiðing hvassliga at norska matvørueftirlitinum. Í heyst vóru umboð fyri eftirlitið í Noregi og vitjaðu norska matvørueftirlitið umframt fiskavirkir, alistøðir og nøkur verksmiðjuskip. Nú skrivar ESA í einari frágreiðing, at eftirlitið við virkjum, sum virka fiskavørur til matna, er ikki nóg gott, skrivar NTB. Eitt nú fann ESA listeria-bakteriur í royktum laksi.



*Góðskueftirlitið við norskum fiskavirkjum er ikki nóg gott (Mynd: Aftenposten)*

## Fastir fundir hjá staðbundnu nevndunum

Runavík: Tá ein hevur eina stóra kommunu er neyðugt at tey, ið sita við høvuðsábyrgdini vita hvat rørir seg í útjaðarinum í kommununi. Runavíkar kommuna hevur fleiri staðbundnar nevndir, og nú er ásett nær tær hava føstu fundir sínar fýra ferðir um árið. Í trimum av bygdunum í kommununi er ásett, at Skálanevndin hevur fundir 5. februar, 6. mai, 2. september og 4. november, meðan Oyndarfjarðarnevndin og Elduvíkarnevndin hevur sínar fundir 6. februar, 7. mai, 3. september og 5. november. Í Oyndarfirði byrja fundirnir kl. 17 og í Elduvík kl. 19, verður sagt á heimasíðuni hjá kommununi. Hans J. Lamhauge, borgarstjóri er formaður í øllum hesum lokalu nevndunum.

# ár á baki



risk/high reward). Í norðara parti av Norðsjónum hevur Kolvetni leitiloyvir, metingarloyvir, og eitt gassframleiðsluloyvi (Schooner). Og í sunnara parti av Norðsjónum hevur felagið framleiðsluloyvi (Minke Main) og fyrireikingarloyvir.

### 26 brunnar fyri framman

Føroya Kolvetni skal luttaka í nógvum boringum komandi tvey árini. Talan er um ikki færri enn 26 brunnar í bæði føroyskum øki, bretskum (Vestanfyri Hetland og í Norðsjónum), og norskum øki. Av hesum eru 11 leitingarbrunnar, 9 metingarbrunnar og 6 fyrireikingarbrunnar (til framleiðslu).

Eitt týðandi lið í menningini av felagnum var at gera innrás í Noregi.

- Tað er ikki lætt at sleppa at luttaka í norskari oljuvinnu. Strong krøv eru galdandi fyri útlendsk oljufeløg, har norsku myndugleikarnir vilja tryggja sær, at eitt felag hevur nakað veruligt at bjóða upp og ikki bara ætlar sær løtuvinning. Eitt av hesum krøvum er prekvalifisering. Tí taka vit tað sum eitt herðaklapp at vit eru sloppin inn í Noregi, har vit hava ognað okkum leitingar- og framleiðsluloyvir, sigur Nils Sørensen.

Seinastu tíðina hevur Føroya Kolvetni fingið stimbrandi orð við á leiðini frá ymsum greinarum, og partabrævaráðgevar hava mælt íleggjarum til at keypa partabrøv í felagnum, tí teir síggja felagið sum eina áhugaverda íløgu.

Sjálvandi fegnast Nils Sørensen um hesa gongdina, men hvat kunnu hann og Føroya Kolvetni brúka slík skotsmál til í veruleikanum?

- Tað er í sær sjálvum gleðiligt, at fokus verður sett á felagið. Góð skotsmál geva eisini mót og áeggjan. Reint ítøkiliga vilja vit royna at innfría tað, ið greinarar hava spátt um okkum, sigur Nils Sørensen.

> *Sjálvandi vera vit við í næstu loyvisrundu við Føroyar, Nils Sørensen, stjóri í Føroya Kolvetni*

Sum heild metir Nils Sørensen grundina til, at Føroya Kolvetni hevur fingið nógva positiva umtalu í seinastuni vera, at felagið hesi 10 árini síðani stovnan hevur ment eina breiða strategi, har nógv sløg av loyvum eru fingin til vega, spjødd yvir stór landafrøðilig økir.

Hetta er við til at spjaða vágan hjá felagnum og skapa grundarlag fyri øktum virksemi og inntøkum, sum koma at gera tilveruna áhugaverdari hjá partaeigarum í Føroya Kolvetni.




*Loyvir hjá Føroya Kolvetni í Norðsjónum og Atlantsmótinum*